

[www.oljan.fo](http://www.oljan.fo)

**Jan Müller** 25 - 08 - 2012

# Greenpeace eftir boripalli í Barentshavinum

Klokkan hálvgum fimm gjáramorgunin tóku nakrir limir í umhvørvisverndarfelagsskapinum Greenpeace seg upp á russiska boripallin Prirazlomnaya, sum leitar eftir olju í Barentshavinum fyri russiska felagið Gazprom. -Eg taki meg upp á hendan boripallin við heimild frá meiri enn einari millión fólkum, sum styðja kravið um at verja Pólhavið og í samhuga við upprunafólkið í tí arktiska partinum av Russlandi, sum ikki vil hava oljuvinnu í teirra økjum, skrivaði Greenpeace-limurin Kumi Naidoo í einum tíðindaskrivi í morgun. Hann og hini Greenpeace-fólkini vóru komin í Barentshavið við skipinum Arctic Sunrise, og í morgun fóru tey í gummibátar og tóku seg upp á tann russiska pallin. Tey siga, at tey hava forðað pallinum at halda fram at bora, og teirra krav er, at Gazprom skal sleppa sínum ætlanum um oljuboring í tí arktiska økinum. Prirazlomnoye er tann fyrsti russiski oljupalllurin í Barentshavinum, men har er eingin framleiðsla enn. Tað er ikki greitt, hvat teir russisku myndugleikarnir gera við tiltakið hjá Greenpeace. ? ?